# Hálvársroknskapurin 2003

Í 1.000 kr.

| Rakstrarroknskapur 1. hálvár | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 159.315 | 163.961 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 34.621 | 48.047 |
| **Rentuinntøkur netto** | 124.694 | 115.917 |
| Vinningsbýti av partabrøvum og øðrum kapitalpørtum | 766 | 183 |
| Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 10.508 | 8.919 |
| Útreiðslur til kostnað og provisiónir | 82 | 885 |
| **Rentu- og kostnaðarinntøkur netto** | 135.463 | 124.134 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | 1.752 | 8.736 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 15.045 | 8.342 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | 152.260 | 141.212 |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsitng | 60.902 | 61.342 |
| Avskrivingar av ítøkiligum og ikkiítøkiligum ognum | 1.621 | 1.655 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | 79 | 0 |
| Tap og burturleggingar fyri skuldarar (netto) | 116.783 | -12.668 |
| Úrslit av kapitalahugamálum | -2.434 | 1.737 |
| **Úrslit av vanligum rakstri undan skatti** | -28.972 | 92.818 |
| Skattur | -5.700 | 18.550 |
| **Hálvársúrslit** | -23.272 | 74.083 |
| **Fíggjarstøða pr. ultimo juni** | | |
| **Ogn:** | | |
| Kassapeningur og ogn í lánistovnum o.a. | 221.873 | 341.979 |
| Útlán | 3.315.608 | 3.366.309 |
| Láns-, partabrøv o.a. | 1.597.857 | 1.537.693 |
| Kapitalpartar í tilknýttum og tilknýttum feløgum | 116.577 | 117.434 |
| Ítøkiligar ognir | 65.318 | 52.143 |
| Aðrar ognir og tíðaravmarkingar | 44.140 | 65.351 |
| **Ogn tilsamans** | 5.360.575 | 5.480.989 |
| **Skuld:** | | |
| Skuld til lánistovnar | 63.363 | 127.284 |
| Innlán | 3.782.749 | 3.822.902 |
| Onnur skuld og tíðaravmarkingar | 30.436 | 32.084 |
| Avsetingar til skyldur | 5.171 | 4.893 |
| Úrslit hetta tíð í ár | 23.272 | 74.083 |
| Eginpeningur | 1.492.127 | 1.418.898 |
| **Skuld tilsamans** | 5.360.575 | 5.480.989 |
| Ábyrgdir | 149.718 | 242.772 |
| Aðrar skyldur | 62.086 | 51.877 |
| **Tøl, sum ikki eru tikin við í javnan, tilsamans** | 211.804 | 294.849 |

FØROYA BANKI



SMS





TRYGD



www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!






*Birgir Enni, skipari á Norðlýsinum. Í 1989 fór hann, saman við øðrum, undir at umvæla Norðlýsið. Teir vóru 10 mans um arbeiðið. Í 1992 tó hann prógv í navigatión og dugnaskapi í at sigla sluppina, og síðani hevur hann veirð skipari*

# Gott tilfar er í sjónum

**Hann er 54 ár, vinnukavari, men upprunaliga útlærdur maskinsmiðjur á Tvøroyri í 1966. Hann er ímyndin av Norðlýsinum, sum hann hevurført seinastu 11 árini, og hann dugir sera væl at matgera – serliga við tí, ið kemur úr sjónum – helst av botni. Maðurin er Birgir Enni, skipari á Norðlýsinum**


TEKSTUR: RANNVÁ MORTANSDÓTTIR

*Myndir Jan Müller og Birgir Enni*


Við Bursatanga í Havn liggur ein snotulig og vøkur slupp. »Norðlýsið« at bryggju henda seinnapart, men er í summarmánaðunum oftast á ferð. Í dag er eitt sindur av mjørka, men annars er stilt og vakurt á sjónum. Skiparin, Birgir Enni, er farin at fyrireika ein túr til Nólsoyar hetta sama kvøldið. Álmanakkan hevur hann eisini funnið fram, at kanna veðurlíkindi fyri vikuskiftistúrarnar, hann hevur í væntu.

Birgir Enni er 54 ára gamal og hevur í fleiri ár skipað fyri túrum við sluppini »Norðlýsið«. Upprunaliga er Birgir maskinsmiður. Prógvið nam hann sær í 1966 á Skipasmiðjuni á Tvøroyri, men hevur hann arbeitt við at byggja havnir ymsastaðni í Føroyum. Sum vinnukavari hevur hann grivið á havbotninum og bygt kaiir, og hevur hann harafturat eisini hjálpt til at umvæla skip, m.a. hevur hann riggað seglskip til á Skipasmiðjuni á Tvøroyri.

Í 1989 fór hann undir at umvæla sluppina »Norðlýsið«. Teir vóru 10 mans um arbeiðið og fór nógv orka til at fáa skipið í stand. Sluppin hevði ligið still í nøkur ár, og tíðin fyri skip av hesum slagi var úti, so har var nógv, ið skuldi umvælast og skiftast út, m.a. eru mastrarnar, stýr-húsið og dekkið gjørt av nýggjum.

Birgir brúkar enn nógva tíð og orku upp á umvælingar og viðlíkahald. Nógv krøv eru fyri at taka slíkt skip í nýtslu, m. a. skal trygdarútgerðin og tað tekniska vera í lagi. Í 1992 tók Birgir prógv í navigatión og dugnaskapi í at sigla sluppina. Hann byrjaði sama árið at gera onkrar útferðir runt í Føroyum, og síðan hevur hetta vundið uppá seg. Tað vísti seg at vera góð undirtøka, og farið var so undir at skipa fyri føstum túrum. Í dag eru túrarnir sera væl umtóktir, og tá ið summarsigling er, hevur hann ógvuliga lítla frítíð.

## Útferðir

Av tí at hann hevur arbeitt so nógvastaðni í Føroyum, kennir Birgir landið sera væl. Hann veit, hvar tey mest áhugaverdu støðini eru, og á útferðunum leitar hann sær til støð, ið eru vøkur at síggja, og eisini hava fuglalív. Hetta tykist at vera tað, ið hevur áhuga hjá teimum flestu.

Í Skúvoy, Mykinesi og Dímun sæst væl av fugli, og eisini verður farið inn í hellur á Heystoynni og Nólsoynni við smærri báti. Hetta eru støð, ið ein annars ikki kemur til, og ein stórur partur av upplivilsinum er eisini skipið sjálvt. Hýrurin umborð er heilt serstakur, og oftast eru fólk sera áhugað, bæði í Føroyum sum land, í skipinum og í teim serstøku støðum, ið farið verður til. Ikki er alt ferðafólk, sum koma umborð. Føroyingar lata eisini væl at túrunum, og skipið verður ofta leigað, bæði til fyritøkur og privat.



*Norðlýsi við Sandoynni í baksíni. Túrarnir til Klæmintsgjógv á Hestoynni eru rættuliga væl umtóktir*

*Framhald á næstu síðu*